## Heilsumálaráðið

# Varastjóri til Landssjúkrahúsið

**Starvið sum varastjóri á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan 1. oktober 2009.**

Sum sjúkrarøktarfakligur varastjóri verður tú ein partur av yvirskipaðu leiðsluni, sum í dag er sett av 4 limum í sjúkrahúsleiðsluni. Tín næsta tilvísing uppeftir verður sjúkrahússtjórin. Landssjúkrahúsið hevur umleið 850 fólk í starvi í fleiri yrkisbólkum.

**Týdningarmestu uppgávurnar hjá varastjóranum verða í høvuðsheitum:**
- at verða við í strategisku planleggingini og arbeiða saman við hinum í sjúkrahúsleiðsluni
- ábyrgd fyri yvirskipaða sjúkrarøktarfakliga rakstrinum og menning
- samábyrgd fyri innføringini av yvirskipaðum málum, strategium og fokusøkjum
- samábyrgd og virkisfýsni at halda fíggjarætlanir og at gera neyðug tiltøk í hesum sambandi
- sjúkrarøktarfakligur ráðgevi og sparringspartnari hjá Heilsumálaráðnum, sjúkrahús- og depilsleiðslunum
- grundgeva og dokumentera yvirskipaða samskipan, býti og umbýti av sjúkrarøktartilfeinginum

**Vit bjóða:**
- eitt avbjóðandi og spennandi starv við møguleika fyri persónligari og fakligari menning
- eina virkna og toymissinnaða sjúkrahúsleiðslu
- eitt sjúkrahús við tørvi og ynski um at styrkja sjúkrarøktaryrkið

**Vit vænta, at tú hevur:**
- sjúkrarøktargóðkenning (autorisatión)
- sjúkrarøktarfakliga víðari útbúgving
- víðari útbúgving á diplom- ella masterstøði innan leiðslu ella annað viðkomandi øki
- fleiri ára leiðararoyndir, helst á ‘yvirsjúkrarøktarstøði’ við fíggjarætlanarábyrgd
- innlit í búskap og royndir við fíggjarstýring
- praktiskar royndir sum sjúkrarøktarfrøðingur á fleiri deildum og gjarna á fleiri sjúkrahúsum

**Í umsøkjaraprofilinum leggja vit dent á, at umsøkjarin:**
- hevur serliga góð samstarvs- og samskiftisevni
- er stigtakari, planleggur og gjøgnumførir
- er málsøkin og hevur analytisk evni
- setur loyalitet høgt og er nóg sterkur til mótgongd í trýstum umstøðum

Sí útgreiðing og tak niður starv og umsøkjaraprofil á www.lsh.fo undir ”leys størv”

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Starvið er áramálssett í 5 ár og verður løntsmb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar á skalastig 49. Útyvir hetta verður veitt eitt áramálsískoyti. Harumframt verður ur veitt eitt ikki eftirlønargevandi sáttmálaískoyti uppá 5.000,- kr. um mánaðin. Setanarøkið fevnir um Heilsumálaráðið við tilhoyrandi stovnum. Tænastustaðið verður Landssjúkrahúsið, og setanarmyndugleikin er Heilsumálaráðið.

**Nærri upplýsingar um starvið, umbøn um umsøkjaraprofil v.m. fáast við at venda sær til:**
- Allan Skaalum, sjúkrahússtjóra tlf. 304500, lokal 1001
- Poul Geert Hansen, aðalstjóra i Heilsumálaráðnum, tlf. 304050

Umsókn við CV skal sendast til:

**Heilsumálaráðið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**FO-100 Tórshavn**

**Umsóknarfreistin er 14. august 2009**
Setanarsamrøður verða 19. august, har upprunaprógv (autorisationsbevis) v.m. skal havast við.

HEILSUMÁLARÁÐIÐ · EIRARGARÐUR 2 · 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 · TELEFAX 35 40 45 · E-MAIL: HMR@HMR.FO

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# STAKSKEIÐ Á MASTERSTIGI Á SØGU- OG SAMFELAGSDEILDINI Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA

## FØROYAR Í 21. ØLD: POLITISKAR AVBJÓÐINGAR

**Námsstig:** 10 ECTS
**Kenslustig:** Master
**Tíð:** Heystið 2009. Undirvísing frá 26. august. Próvtøka í desember.
**Lærarar:** Jens Chr. Svabo Justinussen, adjunktur, Beinta í Jákupsstovu, lektari og gestafyrilestrahaldarar.
**Endamál:** Nakrar av teimum størstu avbjóðingunum fyri Føroyar koma sum rák uttanífra. Endamálið við hesum skeiði er at varpa ljós á nakrar altjóða broytingar, og hvussu hesar broytingar verða ástøðiliga tulkaðar. Serliga verður hugt at, hvat hesar broytingar kunnu fara at merkja fyri Føroyar.
**Evni,** sum verða umrødd, eru m.a. fíggjarkreppan, trygdarpolitikkur, politisk tiltøk í sambandi við veðurlagsbroytingar, Útnorðurlondini og ES, røkt og brúk av fiskistovnum, vinnuligar broytingar og bygnaðarbroytingar í almennari umsiting.
**Undirvísing:** 6 seminar à 2 dagar um ávís evni, við framløgum frá lærarum og gestafyrilestrahaldarum. At enda verður próvtøkuseminar, har tey lesandi leggja fram.
**Próvtøkuformur:** Innlatingaruppgáva, sum verður mett av lærara og uttanseturs próvdómara. Framløga av evninum fyri próvdómara, lærarum og hinum lesandi. Próvtalið verður ein samlað meting av skrivliga og munnliga avrikinum.
**Fortreytir:** Tey lesandi skulu hava samfelagsfrøðiliga útbúgving á bachelorstigi.
**Undirvísingarætlanin** fyri skeiðið verður klár 23. juni 2009, eftir hetta verður ætlanin at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

Fleiri upplýsingar um skeiðið fáast við at venda sær til Beintu í Jákupsstovu á beinta@setur.fo

## FØROYSKUR KOLLEKTIVUR ARBEIÐSRÆTTUR

**Námsstig:** 10 ECTS.
**Kenslustig:** Master (ætlað at verða góðskrivað á M.A. í løgfrøði, LL.M., cand. jur. o.l.)
**Tíð:** Heystið 2009. Undirvísing frá 19. oktober. Próvtøka medio desember.
**Lærarar:** Kári á Rógvi, lektari og gestafyrilestrahaldarar.
**Endamál:** At veita innlit í føroyska felagsverklóg (kollektivan arbeiðsrætt), serliga í tær mongu rættarkeldurnar á arbeiðsmarknaði merktum av spjaddum rættarskapandi stovnum sum fakfeløgum, dómstólum, millumtjóða stovnum umframt lóggávuvaldi og fyrisiting, ið merkja eina ymiskliga og broytiliga støðu. Dentur verður lagdur á háttalag at lýsa og greina rættarstøðuna.
**Evni:** Mest týðandi tilfar verða felags sáttmálar millum arbeiðsgevara- og løntakarafeløg, nakrar tinglógir og grundreglur, umframt dómar og aðrar úrskurðir, ið tulka og brúka felags rættarreglur á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Harumframt verður hugt at tilfari úr grannalondum til samanberingar. Stórur partur av tilfarinum sæst á www.lnd.fo og www.fg.fo. Lærubók er ikki, men vísast kann á hesar bøkur úr grannalondum okkara: Jan Fougner o.fl.: Kollektiv arbeidsrett og Jens Kristiansen: Den kollektive arbejdsret.
**Undirvísing:** Undirvísingin verður skipað við framløgum frá lærara og gestafyrilestrahaldarum – ætlandi dómarum og lærdum úr Danmark, Noregi og Føroyum. Eisini verða studentaframløgur. Undirvíst verður níggju mánadagar frá kl. 09:00 til kl 15:00.
**Próvtøkuformur:** Skrivlig avrik telja 1/3 av próvtalinum (betra av tveimum uppgávum), munnlig próvtøka 2/3.
**Fortreytir:** Tey lesandi skulu hava akademiska útbúgving á minst grundstigi (bachelor) við nóg mikið av løgfrøði ella javnmettum fakum, t.d. Grundskeiði í lóg ella líknandi.

Fleiri upplýsingar um skeiðið fáast við at venda sær til Kára á Rógvi á kariar@setur.fo

**Skeiðsgjald:** Kr. 5.500,00 fyri hvørt skeiðið. Lesandi, sum eru innskrivað við Fróðskaparsetur Føroya ella við annan hægri lærustovn, fáa skeiðið ókeypis.

**Umsóknarblað** fæst við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncks gøta 25, 4.h., Tórshavn, tlf. 352580. Víst verður eisini til heimasíðuna: www.setur.fo

**Umsóknarfreistin er sett til týsdagin 30. juni 2009.**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

Lesið Sosialin

ZARTEC.NET · tlf. 226459
Zartecbygging@hotmail.com
Lat okkum hoyra frá tykkum og fá eitt gott tilboð.
ZARTEC BYGGING